## Flogfar fór í luftina

Eitt flutningsflogfar sprongdist, tá tað skuldi seta seg í Narita-floghavnini uttan fyri Tokyo í morgun. Teir báðir flogskipararnir vóru einsamallir í flogfarinum, og teir vóru deyðir, tám bbjargingarlið sluppu fram at tí brennandi flogfarinum. Myndugleikarnir í Japan siga, at tað var illveður við nógvum vindi, tá vanlukkan hendi, og at ein hørð hvirla tók flogfarið út av breytini, har tað fór í luftina. Flogfarið var gamalt av slagnum MD-11 og kom úr Guangzhou í Kina. Eitt japanskt flutningsfelag átti tað.



## Samgonguavtala í Ísrael

Í Ísrael hevur Likud-flokkurin hjá Benjamin Netanyahu skrivað undir samgonguavtalu við tann átrúnaðarliga høgraflokkin Shas. Sambært avtaluni fær tann sera høgrasinnaði flokkurin fýra ráðharrar í nýggju stjórnini. Shas fær millum annað innanríkisráðharran og ráðharran í búsetingarmálum, og tað kann fáa týdning fyri stríðið um jødisku búsetingina á Vestara Áarbakka. Við semjuni við Shas hevur Netanyahu tryggjað sær stuðul frá 53 tinglimum, men hann skal upp um 60, og tí roynir hann nú at fáa Arbeiðaraflokkin upp í samgonguna. Við sínum 13 tinglimum kann Arbeiðaraflokkurin tryggja stjórnini meiriluta.

# Eingin ynskidreymur at gerast fyrstafrúa

**- Hetta er ikki mín ynskistøða, sigur føroyska Sólrun Jákupsdóttir Løkke Rasmussen, sum stendur til at blíva forsætisráðharrafrúa í Danmark**

DANMARK
*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*

Føroyska Sólrun Jákupsdóttir Løkke Rasmussen er ikki serliga heit fyri at gerast fyrstadama í Danmark.

Maðurin hennara, Lars Løkke Rasmussen, stendur til at blíva næsti forsætisráðharrin í Danmark, um Anders Fogh Rasmussen - sum nógv bendir á - um stutta tíð verður valdur til næsta NATO-aðalskrivara.

- Hetta er ikki mín ynskistøða, sigur Sólrun Jákupsdóttir við Ekstrablaðið í gjár.

Hon staðfestir yvirfyri Ekstrablaðnum, at hon stendur við tað, sum hon segði við blaðið Kvinnu í fjør.

Tá segði Sólrun Jákupsdóttir, at hon var glað fyri, at maður hennara ikki var forsætisráðharri. Men hon staðfesti eisini, at hon ætlaði ikki at gera nakað fyri at forða manninum í at fáa starvið.

- Um Lars verður forsætisráðharri, mugu vit taka tað við, men eg ynski mær tað ikki, segði Sólrun Jákupsdóttir við Kvinnu.

Men eru áhaldandi gitingarnar í donsku fjølmiðlum eftirfarandi, so verður Lars Løkke Rasmussen um stutta tíð forsætisráðharri í Danmark.



*Sólrun Jákupsdóttir Løkke Rasmussen úr Havn verður fyrsta føroyska forsætisráðharrafrúa í Danmark, um Anders Fogh Rasmussen verður NATO aðalskrivari*

# Filmur um Havnina til borgarnar

**Tórshavnar kommuna er í holt við at framleiða film um Havnina tey seinastu 100 árini, sum í summar skal latast øllum havnaborgarum**

MENTAN
*Eilen Anthoniussen*
*eilen@sosialurin.fo*

Í samband við 100 ára føðingardagin, hevur Tórshavnar kommuna gjørt sáttmála við filmsfyritøkuna Substanz Film at gera ein DVD film um Havnina í 100 ár.

Eins og í filmunum Føroyskar Søgur er talan um tilfar frá privatum fólki. Hópurin av tilfari er savnaður, men sóknast verður eftir nýggjari upptøkum, t.e. frá seinastu 20-30 árunum úr Tórshavnar kommunu.

Tórshavanar kommuna sigur í tíðindaskrivi, at lidni filmurin um Havnina verður borin í hvørt hús í Tórshavnar kommunu 16. juni 2009. Filmurin verður ikki søluvøra, men er 100 ára gáva til allar borgarar í kommununi.



## Leita eftir føroyskum filmsleikarum

**Nú verður høvi at lata seg royndarfilma til norska filmin »Buzz Aldrin«, sum verður tikin upp í Føroyum í summar**

FILMUR
*Anna V. Ellingsgaard*
*anna@sosialurin.fo*

Sunnudagin 29. mars verður royndarfilming til norska sjónvarpsfilmin í fýra pørtum, sum byggir á skaldsøgu eftir Johan Harstad.

Royndarfilmingin fer fram í hølunum hjá »Klippfisk«, í J.H. Schrødersgøtu í Havn.

Tað einasta, tú skal gera, er at fyrireika eina stutta søgu, umleið tríggjar minuttir, sum tú skalt fortelja á donskum/norðurlendskum.

Í fyrstu atløgu verða øll filmað. Síðan verður valt út til annað umfar.

**Filmsliðið leitar eftir persónum til hesar leiklutir:**
Ennen, genta /kvinna (25 - 29 ár)
Palli, maður (35 - 38 ár)
Anna, kvinna (29 – 34 ár)
Eyðdis, genta/kvinna (24 - 27 ár)
Sofus, smádrongur (7 – 12 ár)
Bergur, maður (45 – 55 ár)

Filmurin verður tikin upp í summar frá 15. juni til umleið 20 juli. Til ber eisini at tekna seg sum statistur.

Ynskir tú at vita meir, kanst tú venda tær til Eyð Matras, tlf.270889 eymatr@post.olivant.fo

Tilmelding: 270889 ella á eymatr@post.olivant.fo í seinasta lagi fríggjadagin kl. 18.00.